




ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo

MYNDIR:
Álvur Haraldsen



*Sofie Helene Jacobsen við ommubørnum:*
*Aftara rað frá vinstru: Stig og William Heinesen, omman, Andreas Restorff á Skálatrø, Heine Heinesen, Marin Restorff Jacobsen*

*Fremra rað: M.C.Restorff, Andreas Restorff Jacobsen og Tórleif Restorff.*

*Stig, William og Heine Heinesen vóru brøður. Marin og Andreas Restorff Jacobsen vóru systkin. M.C. og Tórleif Restorff vóru brøður.*

*Tað er Tórleif, sum hevur skrivað lýsingina av Heina í hesi grein.*

# Deyður í Vancouver – jarðaður í Havn í 1927

**Seinasta hósdag boðaðu vit frá eini nýggjari greinarøð undir heitinum »Hendur ið sleptu«. Her vilja vit lýsa søguna hjá persónum, sum eru grivnir í gamla kirkjugarði í Havn. Summar søgur er kendar, meðan aðrar eru ókendar. Men nógvar eru áhugaverdar. Fyrsta frásøgnin er um Heina Heinesen, sum var beiggi William Heinesen. Hetta er ein hjartanemandi søga um foreldur, sum fyri alt í verðini vildu hava sonin jarðaðan í Føroyum, hóast hann var deyður hinumegin knøttin í Vestur Kanada.**

Innskriftin á gravsteininum sigur, at Heine er føddur 21. oktober 1902 og deyður í Vancouver 24. januar 1927. Niðast á steininum stendur: *Er ikke død men sover.*

Heine gjørdist tískil bert 24 ára gamal. Hetta ber boð um eina serliga søgu, og hana hava vit í blaðnum í dag.

Heine var næstelsti sonur Carolinu og Zacharias Heinesen í Havn. Zacharias var jú stórkeypmaður fyrst í undanfarnu øld. Fyrra partin í undanfarnu øld, hevði hann handil í húsinum, har Sosialurin heldur til nú.

Zacharias vildi, sum tað eisini var náttúrligt, seta synirnar við í síni fyritøku, so virksemið kundi varðveitast í ættini. Ein sonur var William, har pápin eisini hevði hesar ætlanir, men hetta eydnaðist ikki ov væl. Kanska var tað líka frægt, at hann slapp at brúka síni evni sum hann sjálvur vildi.

Tað sama var við Heina, sum var nøkur fá ár yngri enn William. Heine starvaðist sum heilt ungur í handlinum hjá pápa sínum í Bringsnagøtu. Hetta er seinni handilin hjá Katrinu Christiansen. Pápin vildi hava Heina at gerast skræddari. Zacharias hevði eisini klæðnahandil, og sagt verður, at øll fólk við virðing fyri sær sjálvum keyptu klæðini frá Heinesen. Heine fór eisini niður fyri at fara í læru sum skræddari. Men hetta var als ikki nakað fyri hann, sum var eitt náttúrumenniskja. Hann vildi arbeiða úti í náttúrini, og hann hevði ongan hug til at sita inni og seyma.

Úrslitið varð, at Heine fór til Amerika í fylgi við einum vini. Hesin var Martin Eystberg, var av Viðareiði og var beiggi Jóan Jakku skómakaran í Havn. Martin var verandi í Amerika til ellisár.

William skrivar um Heina: *Min broder Heine holdt meget af god musik, hans yndlingsstykke var Beethovens Egmont Ouverture, som han i sin canadiske udlændighed forsøgte at fremtrylle ude på Prærien ved hjælp af en Harmonika.*

Heine var skóghøggari í Canada, og hetta svaraði eisini til hansara lyndi. Tað sama gjørdi Martin fyrstu tíðina, so tað kann hugsast, at teir hava verið saman.

Heine kann hava fingið hugin at fara til Canada frá mammubeiggjanum Johan, vanliga kallaður Jan, sum fór til Canada í 1911. Hann kom tó heim aftur í 1915. William skrivar um teir báðar, at teir høvdu *»en urolig natur med en vis skæbnesvanger udvé i brystet.«* Annars verður Heine væl lýstur í frásøgnini hjá systkinabarninum Torleif Restorff.

## Til Vancouver eftir líkinum av soninum

Ein dagin fáa foreldrini hjá Heina fyrst boð um, at Heine er sjúkur, og var hetta vist tyfus ella tuberklar. Síðan frættist, at hann er við at kom fyri seg aftur. Men so hevur hann fingið afturstig, og síðan fáa foreldrini deyðsboðini. Hetta kom sjálvsagt illa við hjá teimum. Kanska hevur pápin følt nakað av skuld fyri, at Heine var farin so langt. Serliga mamman tók hetta sera tungt.

Men hvussu var og ikki. Zacharias fer allan tann langa vegin til Vancouver eftir líkinum av soninum. Hetta hevur verið ein sera long ferð, ein triðing av knøttinum. Fyrst var at sigla til Danmarkar. Hetta hevur tikið sínar tríggjar dagar. Síðan mátti farast við ferðamannaskipi, helst til New York. Ikki fyrr enn tá var Zacharias komin hálva leið. Tað er nevniliga longri teinur tvørtur um Canada, nevniliga 5.600 km, enn um Atlantshavið. Ferðin um Canada má hava verið við toki og hevur í hvussu er tikið fleiri dagar,




*Hetta er handilin hjá Zacharias Heinesen í Bringsnagøtu, har Torleif Restorff, sum er frásøgumaður til lýsingina av Heina á næstu síðu, og Heine Heinesen spældu í kjallaranum sum dreingir. Sum tað sæst er hetta eisini seymistovu, og hesa mann pápin hava ætlað Heina. Men hesum hevði Heini als ikki áhuga fyri.*



*Børnini hjá Carolinu og Zacharias Heinesen, frá vinstru Heini, Bergliot, Stig og William*



*Á GRAVSTEININUM STENDUR:*
*Heine Heinesen*
*Født i Thorshavn 21. oktober 1902*
*Død i Vancouver 24. januar 1927*
*Er ikke død men sover*

kanska upp ímóti eini viku. Og so sama veg heimaftur úr Vancouver við eini kistu. Sjálvt tá ið menn doyðu í Íslandi um hesa tíðina, vórðu teir jarðaðir har, tí tað var ov stríggið at føra líkini heim.

Heine varð balsameraður, og Zacharias kom heim við honum í zinkkistu. Tað var ein lítil lúka í kistini, sum kundi latast upp, so tað bar til at síggja Heina fyri seinastu ferð. Hetta hevur uttan iva verið sera kensluborið. Men kanska er hetta eisini íblásturin inn innskriftina á gravsteininum, um »han sover«. Hann hevur sæð út, sum um hann svav.

Hvussu drúgv henda ferðin hjá Zacharias hevur verið, fæst ein ábending um, tá ið vit vita, at Heine er jarðaður 13. mars. Tað hevur tískil gingið hálvur annar mánaði, frá tí Heine doyði, og til hann varð jarðaður.

Egi Dam kendi væl Elisu og William, og tey fortaldu honum, at tað var júst í sambandi við heimkomuna av kistuni hjá Heina, at tey bæði gjørdust par. Elisa var annars arbeiðskona hjá Heinesen.

William var jú listarmaður, so hann gjørdi hesa bustina av beiggja sínum, sum kom at standa inni í hansara gravsteini. Tískil kann kanska sigast, at hann hevur verið nærverandi alla tíðina, og nú verður hann so ikki gloymdur. William uppkallaði sín elsta son eftir Heina.

Tey munnu vera sera fá, sum í dag minnast Heina. Men ein er kortini, og er hetta Martha Matras. Hon er fødd í 1908, er 97 ára gomul, og bert seks ár yngri enn Heine. Tey búðu mestsum í sama grannalagi sum Zacharias Heinesen, Martha minnist øll húsfólkini hjá teimum. Systir Marthu, Poula, arbeiddi eisini hjá Heinesen.

Tá tað er eydnast at fáa eina so góða lýsing av Heina, er tað fyrst og fremst takkað verið beinasemi og áhuga hjá hansara familju. Hetta hevur ikki minst verið frá bróðursoninum Heina, sum hevur útvegað okkum lýsingina hjá Torleif. Myndirnir eru fingnar frá Johan Restorff Jacobsen.

Hetta er tískil blivið ein hugtakandi lýsing av einum ungum havnardreingi, sum ikki vildi setast í bás.

Tann komandi lýsingin í hesi røð verður av Angeliku og Jóhannes Henriksen, foreldrini hjá Palla. Angelika sat einkja í ikki minni enn 60 ár.



*Bringumyndina av Heina Heinesen, yngra bróðir Williams, sum er sett inn í gravsteinin, hevur William Heinesen gjørt*

# Lýsing av Heina

## – yngra bróðir William Heinesen



**Torleif var sonur Linu og Frants Restorff, sum er kendur frá bakarínum við sama navni. Hann var dupult systkinabarn við Heina, og hann hevur skrivað privatar endurminningar, har hann eisini umrøður Heina. Hetta er ein stuttlig og áhugaverd lýsing av Heina og eisini av lívinum hjá dreingjum fyrst í undanfarnu øld, sum vit endurgeva nærum, sum hon er skrivað**

Det var svir at komme derover. William, som var små ti år ældre end jeg, havde jeg ikke så meget at gøre med på det tidspunkt. Det var mest Heine, som jeg så op til. Han var i mine øjne idealet af en rask dreng. Han havde også det legetøj, som jeg alle mine drengeår ønskede mig. Han havde boksehandsker, messingtrompet og sabler, både af metal og hjemmelavede. Uden tanke for følgerne, lå vi i den lille elv, som gik forbi deres hus og legede med mere eller mindre hjemmelavede både. Han fortalte mig om den store laks, han havde set i elven, og om de store søuhyrer, der nemt kunne forvilde sig fra ósan ved Kongebroen. Han havde altid en drabelig lommekniv parat, hvis han skulle være heldig at træffe et af disse søuhyrer.

Det var med bankende hjerte, når jeg våbenløs og alene vovede mig ned i den af konservesdåser og knuste flasker fyldte elv, der nærmest var at sammenligne med en kloak, hvad den også senere er blevet brugt som. Særligt spændende var det, når Heine tog mig ned i forretningen i Bringsnagøtu. Der var meget spændende at se på og opleve. Nede i kælderen hvor min onkel (Z. Heinesen) gemte ulden, han indkøbte, var der mørkt og fyldt med alle mulige og umulige ting. Der havde Heine sit domicil. Han kendt hver krog, hver kasse og andre ting, man skulle træde over. Han ville altid, at jeg skulle gå først. Det viste sig, at han trods alt var angst. Særlig var det edderkopperne, han havde afsky for, og dem var der mange af. Jeg morede mig med, da jeg opdagede hans skræk for disse uskyldige dyr, at gøre ham forskrækket ved at fortælle ham, at jeg havde en æske i lommen fyldt med edderkopper, jeg havde samlet sammen. Jeg kunne risikere at blive belønnet med et af hans kæreste legetøj, hvis jeg tilintetgjorde æsken og lovede aldrig at gøre ham forskrækket mere.

### Heine var eisini listarmaður

Han havde, som de øvrige i den Heinesenske familie, en kunstnerisk åre. Han tegnede skjolde af kiksetøndelåg med drabelige figurer, mest dødningehoveder i bronze. De skinnede lidt i den mørke kælder. Så var det, at han sendte mig som en fortrop for at se, om disse figurer pludselig blev levende. Heine var ellers en modig dreng, men hans livlige fantasi gjorde, at tingene blev levende.

Fritleif Johannesen, der var hans bedste ven, havde mellem mange uhyre interessante ting en båd der hed Álurin…Denne båd var de to venner ude i, når der ikke var andet mere spændende på tapetet. Jeg fik ofte lov til at komme med dem skønt strengt forbud fra mine forældre. Engang vi lå og fiskede ud for Argjahøvda, var der en stor rødtorsk, der snusede til mit agn. Heine kneb mig i armen som tegn på, at vi måtte være musestille, så denne store fangst ikke gik os af hænde. Langt om længe bed torsken på, og jeg trak til alt som jeg orkede. Heine blev ivrig, han troede åbenbart ikke på mine kræfter og grejets holdbarhed. Så han sprang simpelthen over bord og ville tage fisken i sin favn, hvilket selvsagt ikke lykkedes.

Jeg kan huske engang, jeg fik lov til at gå med ham ud í Hornatrøð om natten for at fange ål i mudderbækkene derude. Han påstod, det skulle foregå i mørke. Han havde en karbidlygte med, både til at se med og at lokke ålene til. Det var ret spændende, men en våd tur, da sådant skulle foregå i regnvejr. Han må åbenbart have vidst besked, for en ret stor ål fangede han, efter at flere var smuttet for ham. Så gik turen hjem til hans forældres køkken, hvor der var en mægtig stor komfur, hvor der var så mange gløder i, at han ved at lægge papir på kunne stege sin ål. Min bror og jeg havde aldrig før set sådan en slange, så vi betakkede os. Derimod spiste Heine den med stor velbehag. Det var jo en mudderål, som nærmest er uspiselige. Heine stegte ofte sin fangst i det køkken. Noget af det bedste han fik var stegte muslinger og øður. Dem kunne jeg heller ikke misunde ham.

### Brøv úr Canada

Efter, at han var rejst til Canada, fik jeg enkelte breve fra ham. I et af de breve fortalte han, at han fattig, som han var, havde lånt en båd ved en stor indsø derovre. Fiske kunne han, og han ville prøve lykken. Det viste sig, at han med de primitive fiskeredskaber, han havde lavet efter færøsk mønster, fangede en mængde fisk, som han ganske vist ikke kendte. Han glædede sig til at afsætte fangsten og så sig selv i ånden som en stor fiskeskibsreder. Det var selvfølglig et chock for ham at få at vide, at fisken var giftig og uspiselig. Det var lige so katastrofalt tilfælde som om en velhavende skibreder gik konkurs.

Jo, Heine var en festlig fyr, som det var værd at skrive en interessant beskrivelse om….